NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føðingar



2. november fekk Freja eina lítlasystur, hon eitur Elisabeth og bleiv 1 ár 12. nov. Foreldrini eru Andrea og Niels Johansen, Frederiksberg.

16. januar bleiv eg stórasystur. Lítlibeiggi vigaði 4440 gr. og var 55 cm langur. Eg eiti Aimi og mamma og babba eita Hildigunn Magnusson og Klaus Vester og vit búgva í Ramløse.

Tann 30. januar fekk Kristin hendan lítla beiggjan. Hann vigaði 3600 g og var 52 cm langur. Mamma og pápin eru Berit og Poul Juul Vilhelmsen.

31. januar fingu Eyðbjørg Andreasen og Hans Petersen, Frederiksberg, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3600 gr.

6. februar fingu Bryngerð Ejdesgaard og Debus Hejnesen, Skals, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3620 gr.

6. februar fingu Birna Abrahamsen og Ian Berg Jørgensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3600 gr.

7. februar fingu Maud Poulsen og Olav Enomoto, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3065 gr.

7. februar fingu Anita og Poul Kári Simonsen, Saltnes, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

9. februar fingu Mariann og Sofus Poulsen, Vatnsoyrar, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3300 gr.

10. februar fingu Randi Røsvik og Svend Jacobsen ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4350 gr.

10. februar fingu Mariann Dalfoss og Óli S. Joensen, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4360 gr.

11. februar fingu Rakel S. Bærendsen og Andrias Jacobsen, Glyvrum, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3200 gr.

12. februar fingu Malan Joensen, Toftum, og Dávur Joensen, Hósvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3000 gr.

Rógvi Johansen útbúgvin myndamaður

Mikudagin 4. februar bleiv Rógvi Johansen, ættaður úr Vági, liðugur við útbúgving sína sum myndamaður, og fríggjadagin 6. februar fekk hann handað prógv. Í dag kann hann av røttum kalla seg yrkismyndamann við serkunnleika í forngrípa-myndatøku.

Rógvi hevur haft eina sera fjølbroytta utbúgving, útbúgvingarstað hansara var Århus Universitet, Institut for Forhistorisk Arkæologi, Middelalderarkæologi, Etnografi og Socialantropologi, lingvistik. Moesgaard Foto/Medielab. Moesgaard Museum.

Arbeiðsuppgávurnar hava verðið nógvar, sera ymiskar og fjølbroyttar, men nakrar av teimum mest áhugaverdu hava uttan iva verðið tær myndatøkur sum gjørdar vóru í samband við tá nýggju framsýningina hjá "Grauballemanden". Til hesa framsýning vóru nógvar og sera áhugaverdar myndatøkur gjørdar.

Rógvi hevur eisini gjørt meginpartin av myndunum til nýggjastu framsýningina á Moesgaard Museum, nemliga av teimum víðakendu forngrípinum frá Illerup Ådalen við Skanderborg.

Tað vóru undangongumenninar P.V. Glob og Harald Andersen, sum vóru við til at avdúka hesir forngrípir, hettar var í 1950 - 1956 og seinni 1975 - 1985. Hesir forngrípir eru m.a. vápn og herðnaðarútgerð frá uml. 200 ár e. kr. har størstiparturin av teimum eru framleidd úr gulli og silvuri og nakrir eisini úr fílabeini.

Hendan framsýningin bleiv opnað av Drotning Margrethu, hon hevur sjálv verðið við til at grava partar av hesum forngrípum fram, tá var hon bert 12 ára gomul, drotningin fekk eina bókaútgavu um hesir forngrípir, hvar fleiri av myndunum hjá Rógva vóru í, umfram bókina fekk Drotningen eisini eina røð av myndunum hjá Rógva. Hesar myndir vórðu lagdar í eina eksklusiva mappu við teksti í á trímum málum. Útgávan er ætlað sum postkort og er at fáa í museumsforrætningini á Moesgaard museum.

Síðan august mánað í fjør hevur Rógvi Johansen verðið deildarleiðari á Moesgaard Foto/Medielab, hvar hann hevur staðið fyri leiðsluni, sum eisini umfatar tríggjar fotografnæmingar.

Frá miðskeiðis í februar byrjar Rógvi í nýggjum starvið sum útbygvin myndamaður á Moesgaard Museum, hetta verður tá fyrstu ferð síðan Moesgaard Museum opnaði fyri meira enn 30 ár síðani, at har vera tveir útbúnir myndamenn knýttir at staðnum.

Julianna og Davis Didriksen silvurbrúdleyp

16. februar 2004 hava hjúnini Julianna og Davis Didriksen í Havn verið gift í 25 ár. Sama dag fyllir Julianna 75 ár. Dagurin 16. februar eitur Julianna.

Julianna er ættað av Strondum, foreldrini vóru Ragnhild, f. Johannesen, og Jógvan Johansen í Gørðum á Strondum.

Mamman doyði bert tíggju dagar eftir at Julianna varð fødd, og pápin sat einkjumaður við fimm døtrum, har tann elsta var 5 ár.

Julianna fór sum 14 ára gomul út at tæna. Hon giftist í 1948 við Kjartan Højgaard á Toftum, og búsettust tey har. Kjartan doyði í 1954, bert 29 ára gamal, tey fingu dóttrina Ásu í hjúnalagnum.

Í 1954 kom Julianna til Havnar at búgva og fekk starv á reinsarínum Ruba, har hon arbeiddi í trý ár.

Í 1955 giftist hon við Ferdinand Andreasen, ættaður av Tvøroyri. Tey fingu seks synir: Kjartan, Jógvan Magnus (Eggaba), Marnar og Árni, sum eru tvíburar, Jóhan Petur og Dan Ingi.

Fleiri av dreingjunum er kendir innan tónleikalívið í Føroyum, sum t.d. við orkestrunum "Black Birds" og "Julianne-Boys".

Julianna hevði ymisk arbeiðspláss í býnum, í handlum, kioskum og pylsuvognum. Hon arbeiddi eini trý ár á Tórs Cafeteria og hevur eisini koyrt hýruvogn í Havn. Hon arbeiddi tilsamans 15 ár á Landssjúkrahúsinum, tíggju ár á A3, síðan á pleygudeildini og fleiri ár á goymsluni.

Julianna hevur eisini verið virkin innan ymiskar felagsskapir sum t.d. Javna og Blindafelagið, har hon hevur spælt fótbólt, runnið posarenning og skipað fyri bingospæli fyri at skaffa pengar til hesi feløg.

Davis er havnarmaður, foreldrini hjá honum vóru: Hanna, f. Jacobsen, ættað úr Søldarfirði, og Christian Didriksen úr Havn.

Hann fekk maskinútbúgving á Tórshavnar Skipasmiðju og arbeiddi har í nógv ár. Hann hevur eisini koyrt nógv hýruvogn í Havn og sigldi í mong ár við skipum hjá Ejler Jacobsen.

Davis eigur fimm børn, tey eru: Kristian, Anna, Sámal, Bergur og Leila.

Dagurin verður hildin í Pálsstovu í dag 14. februar.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Dupult gullbrúdleyp

Louisa og Christian Olsen 1954 – 8. februar – 2004
Alma og Jóhan Tauser 1954 – 27. februar – 2004

Christian og Louisa Olsen

Alma og Jóhan Tauser

Tað er ikki á hvørjum degi, at tvey pør saman hátíðarhalda, at tey hava verið gift í hálvt hundrað ár. Soleiðis er tað í dag, leygardagin 14. februar. Tá er dupult gullbrúdleypsveitsla í Badmintonhøllini í Havnini. Tað eru Louisa og Christian Olsen við Gjógv og Alma og Jóhan Tauser í Havnini, sum hava sligið seg saman um at hátíðarhalda stóra dagin.

Tær báðar eru systrar og ættaðar av Oyrabakka. Foreldrini vóru Dánjal, sum var ættaður av Sandi, og Jacobina, sum var ættað úr Tjørnuvík. Tey búsettust á Oyrabakka og fingu tíggju børn. Louisa var tann fimta og Alma tann sætta í røðini.

Louisa, sum er fødd 24. mars í 1923, giftist 8. februar í 1954 við Christiani Olsen frá Gjógv, sum er føddur 2. juli í 1926. Foreldrini hjá honum vóru Anna Sofia og Carl Olsen, sum var dani. Mamman doyði á barsilssong, tá ið hon hevði átt Christian, og hann vaks upp í Lon við Gjógv, har fleiri av ógiftu børnunum hjá Kvíviks Jógvani búðu. Christian átti eina systur, Elisabeth, sum giftist til Elduvíkar. Í seinni giftum fekk Carl tríggjar døtrar. Elisabeth býr í Klaksvík, og Elin og Louisa búgva niðri.

Louisa og Christian búsettust við Gjógv, og tey fingu trý børn: Jónsvein, sum býr í Rituvík, og Dania og Annjó, sum búgva í Havnini. Barnabørnini eru níggju og eitt er komið í triðja ættarliðnum.

Louisa hevur verið húsmóður, og Christian var, sum so nógvir aðrir gjáarmenn vóru tað tá í tíðini, sjómaður. Hann sigldi nógv við línuskipum. Síðani hann legðist uppi, hevur Christian ikki heilt slept sambandinum við sjógvin. Tað sæst eitt nú aftur í, at hann hevur egnt nógv.

Alma, sum er fødd 15. august í 1926, giftist 27. februar í 1954 við Jóhan Tauser. Hann er føddur 28. juni í 1925 og er ættaður úr Havnini, har tey bæði hava búð hesa seinastu hálvu øldina. Foreldrini hjá honum vóru Alexandra og Jóhannes Tauser. Hon var av Skála, og hann var av Eiði. Jóhan var elstur av trimum beiggjum. Hinir eru Jákup Martin og Gunnar. Nakað eftir at Alexandra var deyð, giftist Jóhannes uppaftur við Elini í Heiðunum. Tey fingu tvær døtrar – Aspa og Jenny. Elin og Jóhannes fluttu til Danmarkar. Tað er ikki øllum unnt at eiga foreldur, tá ið tey halda gullbrúdleyp. Tað ger Jóhan Tauser. Pápi hansara, Jóhannes, verður 23. februar 102 ár. Hann er púra klárur, og tað sigst, at hann framvegis fæst við at baka breyð.

Alma og Jóhan eiga trý børn – Alexandra, Dánjal og Jóhannes. Tey búgva øll í Havnini. Barnabørnini eru seks.

Alma hevur verið húsmóður, og Jóhan hevur fingist nógv við at koyra bil. Eitt langt skifti koyrdi hann í bilstøðini Taxa, og so koyrdi hann í mong ár vørukoyring fyri hospitalið.

Tað er í kvøld klokkan sjey, at hesi bæði hjúnini saman við 270 gestum fara at hátíðarhalda gullbrúdleypini í Badmintonhøllini.

Thomas Pauli Jacobsen 80 ár



10. februar fylti Thomas P. Jacobsen í Havn 80 ár. Tummas er føddur í Nólsoy, sonur Clement og Petru Jacobsen. Hann er fjórðelst av 11 systkjum, og eru tey nú bert trý eftir á lívi.

Í 1939, júst fyltur 15 ár, fór Tummas til skips við "Sea King", og har byrjaði hansara lívsleið sum sjómaður.

Í 1940 fór Tummas til Grønlands við "Miguenette". Heimafturkomin fór hann at røgva út, men í 1944 fór hann aftur til sjós við "Miguenette". Í 1945 fór hann aftur við "Sea King" (seinni Norðstein).

Tummas tók setiskiparaprógv í 1946. Haðani fór hann við "Vesturleið" sum bestimaður, til hann í 1948/49 tók longdina.

Í 1949 var Tummas við "Jórun" sum bestimaður, men sama ár gjørdist hann medeigari av "Grønlandsfarinum", og fór við har sum bestimaður. Seinni gjørdist Tummas skipari á "Grønlandsfarinum".

"Grønlandsfarið" fórst í Grønlandi í 1953, so árið eftir róði hann út í Grønlandi. Í 1955 var Tummas skipari við "Royndini" og í 1956 bleiv hann stýrimaður við "Hólmi", sum hann átti í.

Í 1959 fór Tummas aftur upp á skúla at taka nýggja skiparaprógvið.

Frá 1960 og til fyrst í sjeytiárunum var Tummas skipari á "Hólmi". Í sjeytiárunum sigldi hann sum supercargo fyri Fiskasøluna, umframt at hann í seinnu helvt av sjeytiárunum av og á sigldi sum skipari á farmaskipum hjá Star Shipping.

Tummas legðist endaliga uppi á land í 1979, og arbeiddi hann í nógv ár hjá Tórshavnar Havn. Seinastu árini, áðrenn pensiónsaldur, arbeiddi hann á Bacalao.

Tummas hevur altíð verið sjómaður av náttúr, og hevur hann eisini roynst sum sannur álitismaður á sjónum. Útróðrarmaður er hann av teimum bestu, so árini síðani hann gavst at sigla, hevur hann verið ótaldar roktúrar við 10-mannafarinum "Borðini". At Tummas er framúrskarandi veiðimaður eru ótaldu lundabyrðurnar, hann hevur veitt í Urðini í Nólsoy, besta dømi um.

Tummas er góður telvari, og hevur hann havt talv sum frítíðaráritív megin-partin av ævi síni.

Tummas giftist í 1958 við Sigbjørg Hansen, eisini úr Nólsoy. Tey eiga tvær døtur, Janet, gift Hentze og býr í Danmark og Eydnu, gift Djurholm, hon býr í Hoyvík. Tummas og Sigbjørg eiga 4 barnabørn.

Tummas er vertskapsmaður, og eru hann og Sigbjørg stak fryntlig at vitja. Eisini telist Tummas millum teirra, sum hevur havt sum aðalmál at svara hvørjum sítt og annars at seta tering eftir nering. Hesin hugburður hevur eyðkent aldrandi ættarliðið, sum eigur heiðurin av, at vit liva í einum tryggum samfelag.

Tummasi verður ynskt hjartaliga tillukku við áttatiára degnum.

Tøkk

Hjartans tøkk tit ið mintust meg á 75 ára føðingardegnum 1. november 2003.

Heilsan
Ejler Sørensen, Porkeri

90 ár

Mánadagin 16. februar verður Hans Peter Djurhuus, fyrrv. skipasýnismaður, 90 ár.

Dagurin verður hildin 15. februar saman við familjuni

70 ár

Mánadagin 16. februar verður Holgar Poulsen, Klaksvík, 70 ár.

Hann verður burturstaddur føðingardagin.

Brúdleyp

Í dag, 14. februar, kl. 14.00 giftast í Rituvíkar kirkju Sonja Olsen, Rituvík, og Hans Olsen, Syðrugøtu.

Døgurði verður fyri foreldrum og systkjum á Svangaskarði. Eftir tað eru øll hjartaliga vælkomin til veitsluna, sum verður í Kvinnufelagshúsinum kl. 21.00 á Glyvrum.

Í dag, 14. februar, kl. 15.00 giftast í Nes kirkju Dagunn Olsen, Tórshavn, og Eyðfinn Clementsen, Sandi.

Brúdleypsadr.: Hotel Hafnia, Tórshavn.

Prógv

Hansina Djurhuus, Søldarfjørður, hevur lokið prógv sum cand. mag. í enskum á Københavns Universitet.

Dagurin

14. februar. Valentinus. Fleiri halgimenni bera hetta navnið: ein biskupur í Terni í Italiu, hálshøgdur í umleið ár 270, ein prestur í Róm, eisini hálshøgdur umleið ár 270, og ein biskupur í Retiu í Norðuritaliu, deyður umleið ár 470.

Í angulsaksiskum londum, serstakliga í Amerika, senda gentur og dreingir hvør øðrum gávur ella skrivligar ástaðarkvæður, valentines, á hesum degi. Tað er helst dagurin hjá halgimenninum, prestinum í Róm sum doyði í 270, sum verður hildin.

Navnið er latín og merkir raskur ella kraftmikil.

Jens Christian Svabo doyði hendan dagin í 1824, 78 ára gamal.

15. februar. Faustinus, deyður umleið ár 120. Brøðurnir Faustinus og Jovita í Brescia í Norðuritaliu vórðu píndir og tiknir av døgum.

16. februar. Juliana, deyð umleið ár 300. Vildi ikki giftast heidna trúlovaða sínum og varð tikin av døgum. Er eisini navn á tveimum øðrum halgikvinnum. Giljanna er føroyskt navnaformurin.

Juliana er rómverskt ættarnavn.

Andlát

7. februar
Hendrik Hansen, Tórshavn, vanliga nevndur Henge, ættaður úr Tjørnuvík, 84 ár.
Randi Heinesen Tjørnuvík, ættað úr Sandavági, 56 ár.

9. februar
Susan Skaaning, búsitandi í Lise Leje, 61 ár

10. februar
Jóhannes Jacob Joensen, Fuglafirði, 88 ár.
Dina Nygård, Porkeri, 76 ár.